FUGLAFJARÐAR KOMMUNA

J.nr. 21/00662

# Skipa-, vøru- og leigugjøld

fyri

Fuglafjarðar havn

**Galdandi frá 1. januar 2022 – 31. desember 2025**

***Gjaldskráin verður endurskoða hvønn desembur mánaða, hon er í gildi.***

***Góðkend av býráðnum 25. Januar 2024***

# Innihaldsyvirlit

Um heftið “Skipa-, vøru-, og leigugjøld” hjá Fuglafjarðar havn ... 3
Kostnaðarpolitikkur Fuglafjarðar havn ... 3
Lógarheimildir ... 4
I. SKIPAGJØLD ... 4
II. VØRUGJØLD ... 4
III. STRANDFARASKIP ... 4
IV. LEIGUGJØLD ... 4
V. ONNUR GJØLD ... 4
I. SKIPAGJØLD ... 5
A. Havnagjald ... 5
1. Fult havnagjald rinda ... 5
2. Undan at gjalda ein part av havnagjaldi sleppa: ... 5
3. Undan øllum havnagjøldum sleppa: ... 5
B. Brúgvagjald ... 5
1. Fult brúgvagjald rinda: ... 6
2. Frá at gjalda ein part av brúgvagjaldi kunnu sleppa: ... 6
3. Undan øllum brúgvagjaldi sleppa: ... 6
C. Legugjald ... 7
1. Lega fyri festum, skipið eigur: ... 7
2. Bátaleiga: ... 7
3. Aðrar gjaldsligar fyriskipanir: ... 7
4. Bátaleiga á landi: ... 7
II. VØRUGJALD ... 8
A. Almennar reglur ... 8
10. Undan at gjalda part av vørugjaldi sleppa: ... 8
11. Undan øllum vørugjaldi sleppa: ... 9
B. Ráfiskagjald ... 10
III. SKIPA- OG VØRUGJØLD FYRI STRANDFARASKIP LANDSINS ... 11
IV. LEIGUGJØLD FYRI LENDI Á HAVNAØKINUM ... 12
V. ONNUR GJØLD ... 13
Gjaldskrá ... 13

# Um heftið "Skipa-, vøru-, og leigugjøld" hjá Fuglafjarðar havn

Heftið "Skipa-, vøru-, og leigugjøld" inniheldur allar upplýsingar um gjøld, sum vera tikin í Fuglafjarðar havn: Fremstar eru lógarheimildir havnarinnar og síðan ymisku gjøldini sambært innihaldsyvirlitinum.

Møguligir spurningar verða at seta havnaskrivstovuni á telefon **238050** ella umvegis teldupost pof@fuglafjordur.fo.

## Kostnaðarpolitikkur Fuglafjarðar havn

Kostnaðir verða ásettir við støði í málsetninginum um, at havn og brúkarar í felag skulu menna virksemið. Samstundis stuðla kostnaðirnir visjón havnarinnar, sum er, at Fuglafjørður skal vera altjóða havn.

Kostnaðarpolitikkurin tekur atlit til støðu og menningarstøði havnarinnar, og kostnaðurin verður tí settur eftir metingini av rakstrarliga- og fíggjarliga tørvinum; samtíðis sum kostnaðurin er ásettur rímiligt og sakligt. Kostnaðurin skal fáa havnini neyðugu inntøkurnar fyri á tann hátt at tryggja skilagott og framtøkið virksemi. Kostnaðurin skal í hesum sambandi eggja brúkarunum, at menna havnina umvegis størri virksemi og umsetning.

# Lógarheimildir

Gjøldini verða ásett við heimild í Lov nr. 7 af 30. januar 1875 om Udfærdigelse af regelmentariske Bestemmelser for Benyttelsen af Havne m.m., sum seinast broytt við løgtingslóg nr. 91 frá 7. juni 2020; umframt Reglugerð fyri Fuglafjarðar havn frá 13. november 1913 við seinni broytingum.

Við støði í nevnda lógargrundarlagi hevur Fuglafjarðar býráð avgerðarrætt, at áseta gjøld/takstir v.m. fyri Fuglafjarðar havn; eisini vísandi til avtøkuna av kunngerð nr. 112 frá 5. juli 1995 um skipa- og vørugjøld fyri havnir og bryggjur, sum annars bygdi á nevndu lóg frá 1875.

Ásetingarnar í hesi gjald- og takstskipan verða býttar upp í hesar bólkar og undirbólkar.

## I. SKIPAGJØLD

A. Havnagjald
B. Brúgvagjald
C. Legugjald

## II. VØRUGJØLD

A) Almennar reglur
B) Gjaldskrá

## III. STRANDFARASKIP

## IV. LEIGUGJØLD

## V. ONNUR GJØLD

Fyri Fuglafjarðar havn eru reglurnar galdandi innan fyri tey av kommununi við løgtingslóg ásettu havnamørk (redmørk) úr eini linju úr Heimarugjógv á norðursíðuni til Tróndargjógv norðanvert Kálvadal á suðursíðuni. Hesi eru mørk eru nærri útgreinað og lýst í "Den færøske lods" og í lýsingum og kunngerðum annars frá Landsverki.

Tó hevur havnin heimild til at krevja upp øll skipa- og vørugjøld eftir nærri ásetingum fyri skip, sum ankra á pollinum innan fyri redmarkið, og/ella fremja umskipan av farmi, fiski, olju v.m.

Fyri havn - bryggju, fyri okkara part bryggjuna á Hellunum, har einki havnamark (redmark) er ásett, galda reglurnar undir IA fyri økir innanfyri brimgarðar ella annað natúrligt mark fyri, hvar havnin er.

Bruttotonsatalið (BRT), sum havna- og brúgvagjaldið verður roknað eftir, er fyri skip longri enn 24 m, eftir millumlanda málibrævi (69) sambært millumlanda sáttmálanum um uppmáling av skipum, 1969. Fyri skip styttri enn 24 m verður málibræv antin sambært Oslosáttmálanum, 1947 ella millumlandasáttmálanum, 1969, nýtt.

Í tekstinum undir II. A: Vørugjøld, almennar reglur, er heitið "havn" nýtt, eisini, tá ið talan er um støð, har eingi havnamørk eru. Í slíkum førum er "havn" at fata sum pláss, bygd, býur ella kommuna.

# I. SKIPAGJØLD

## A. Havnagjald

### 1. Fult havnagjald rinda

a) Øll før størri enn 4 skrásett bruttotons (BRT) ella bruttotonsatal 4 (NT), ið koma inn í havnina, skulu við niðanfyri standandi undantøkum, annaðhvørt tey eru fermd við vøru, kjølfest ella tóm, í havnagjaldi lata **kr. 0,85** tonsið brutto.

b) Har redmark eru góðkend, skal sama gjald verða latið av teimum førum, ið løgd verða fyri akker á redini, tá ið tey taka vøru frá landi ella lata vøru til lands, umskipa vøru, seta fólk í land ella taka fólk umborð, og av teimum førum, ið løgd verða við til bryggju ella brúgv innan fyri sjálvt redøkið.

### 2. Undan at gjalda ein part av havnagjaldi sleppa:

a) Fiskiskip heimahoyrandi í Føroyum. Lata bert havnagjald 3 fyrstu ferðirnar í hvørjum álmanakkaári.

b) Sett úr gildi 25.01.2024

c) Strandfaraskip Landsins í regluligari innanoyggjasigling eftir fastari ferðaætlan svara ½ havnagjald hvørja ferð, tey koma inn í havnina. Hesi før kunnu tó gjalda eftir teim í III nevndu reglum.

d) Før, sum koma fleiri ferðir inn í havnina sama samdøgur, gjalda fult ~~½~~ havnagjald eina ferð.

e) Før, sum eftir farmaskjølum sínum ikki hava verið ætlað til havnina, men sum vegna skaða, teimum hava verið fyri, hava verið noydd at seta inn í havnina, svara ikki~~½~~ havnagjald, um tey leggja at bryggju ella brúgv.

### 3. Undan øllum havnagjøldum sleppa:

a) Øll før, ið ríkið eigur, og sum føra bæði sýlt flagg og vimpil; og øll før úr útlendskum herflota.

b) Vaktar- og bjargingarskip, sum landið ella ríkið eigur, sleppa eisini undan gjaldi.

c) Privat vaktar- og bjargingarskip, ið fremja neyðugt upptøkuarbeiði í sambandi við møguliga havdálking á bæði Fuglafirði og tí parti av Oyndarfirði, ið partur er av Fuglafjarðar kommunu (Hellurnar).

d) Sjúkraskip hjá "Reyða Krossi" í ófriðartíðum, skúlaskip, tá ið tey ikki koma í havn at skipa farm inn ella upp. (Donsk skúlaskip skulu verða góðkend sum slík av Fiskimálaráðnum/Vinnumálaráðnum). Útlendsk skúlaskip eiga, tá ið ivamál uppstanda, at verða góðkend sum tílík av sendiráðstovu, konsulati ella umboðsmanni hjá hesum landi. Sama er galdandi fyri havnransóknarskip.

e) Tey undir A.2.d. nevndu før, tá ið tey ikki leggja at bryggju ella brúgv.

f) Før, ið eftir at tey eru farin úr havnini, koma inn aftur og ikki í millumbilinum hava verið í nakrari havn uttan fyri Føroyar, og ei heldur hava uppskipað, fermt ella fiskað.

g) Flótandi arbeiðstól, sum bert verða nýtt av sjálvari havnini í sambandi við íløgu- og /ella umvælingararbeiði.

h) Før, ið einans hava verið inni í havnini til at rætta kumpass, til at skifta manning, seta á land, sjúk, lík ella skipsbrotin, og til at taka leiðvísara (loðs) ella seta hann í land. Tó sleppa tílík før ikki undan havnagjaldi, um so er, at støðgurin í havnini er longri enn 24 tímar.

## B. Brúgvagjald

## 1. Fult brúgvagjald rinda:

Øll før, størri enn 4 skrásett tons brutto (BRT) ella bruttotonsatal 4 (BT), ið leggja at bryggju ella brúgv, skulu við niðanfyri nevndu undantøkum, annaðhvørt tey eru fermd við vøru, kjølfest ella tóm, í brúgvagjalda lata fyri hvørjar byrjaðar 24 tímar: kr. 0,75 fyri hvørt skrásett tonsið brutto.

## 2. Frá at gjalda ein part av brúgvagjaldi kunnu sleppa:

a) Fiskiskip, sum javnan koma í havnina at avreiða. Viðvíkjandi hesum skipum kann býráðið (vinnu- og havnanevndin) gera serligar gjaldsskráir, t.d. seta ávís ársgjøld, sum tey einkultu skipini so seta seg fyri.
b) Vinnu- og havnanevndin og havnastjórin fáa um neyðugt heimild til at gera seravtalur um brúgvagjøld fyri skip, sum í longri tíð koma at liggja við bryggju, eitt nú í sambandi við umvælingar. Hesi skip verða undantikin 2.g) um tey 28 samdøgrini.
c) Sambært avgerðum býráðsins um 2.d. er talan um fiskiskip, útróðrarbátar, farmaskip og sandbátar.
d) Strandfaraskip Landsins í regluligari innanoyggjasigling eftir fastari ferðaætlan svara ½ brúgvagjald. Hesi før kunnu tó koma undir teimum í III nevndu reglum.
e) Øll onnur gjøld hjá hesum skipum, sum koma undir 2.b og c skulu rinda onnur gjøld til havnina, sum t.d. havnagjøld, legugjøld, skipagjøld, vatngjøld eftir galdandi takstum.
f) Skip við bruttotonsatali (BT) oman fyri 1.400, sum liggja fleiri enn 28 dagar við bryggju, gjalda fult brúgvagjald fyri tey fyrstu 28 samdøgrini og síðani verður møguligur avsláttur avtalaður við havnastjóra í samráði við vinnu- og havnanevndina.
g) Skip í regluligari sigling til/frá Fuglafirði gjalda fast mánaðargjald fyri havna og brúgvagjald á 9,0 kr. pr. bruttotons

## 3. Undan øllum brúgvagjaldi sleppa:

a. Tey undir A.3a, b, c og d nevndu før.

## C. Legugjald

### 1. Lega fyri festum, skipið eigur:

- Før, ið leggja (vetrar) legu úti í havnini, t.v.s. innan fyri ytra redmerki, fyri egnum festum, rinda fylgjandi gjøld til havnakassan:
  a)Deksfør, minni enn 30 /BRT/BT: kr. 500,000,- árliga.
  b)Før størri enn 30/BRT/BT kr. 2.000,000,- árliga.

### 2. Bátaleiga:

- Í sambandi við skrivligar sáttmálar, sum eigarar av smábátum gera við havnina um legupláss í bátahavnini, verður gjald fyri hesar at krevja upp eftir hesi skipan:

| 1-5 | Bátaslag: | Vegleiðandi breidd: | Gjald pr. ár: |
|---|---|---|---|
| 1 | Fýramannafar og minni >21 fót | 160>199 cm. | 805 kr. |
| 2 | Seksmannafar 22>24 fót | 200>229 cm. | 1.380 kr. |
| 3 | Áttamannafar 24>26 fót | 230>259 cm. | 2.070 kr. |
| 4 | Tíggjumannafar 26>28 fót | 260>289 | 2.530 kr. |
| 5 | Seksæringur og størri 28> fót | 290 > | 3.450 kr. |

### 3. Aðrar gjaldsligar fyriskipanir:

- Fyri aðra nýtslu av havnini kann kommunan, við góðkenning býráðsins, krevja serstakt gjald.
- Gjøld fyri legupláss til smábátar verður javnað árliga í mun til prístalið. Fyrstu ferð javnað verður, er til 2.hálvár 2025, tá javna verður í mun til prístalið 3. Ársfjórðing 2024. Javnað verður bert við príshækkingum.

### 4. Bátaleiga á landi:

- Galdandi fyri bátar, sum standa á landi, at teir fyrstu 18 dagarnir er uttan kostnað, og teir næstu dagarnir kosta 30 kr. pr. dag.

# II. VØRUGJALD

Fyri útrokning og avgreiðslu av gjaldi av vørum (lutum) galda hesar reglur:

## A. Almennar reglur

1. Gjaldið verður latið av øllum vørum, komandi og farandi, ið verða upp- ella innskipaðar ella á annan hátt verða flotaðar ella førdar í land á liggja við bryggju ella brúgv, í havnini, á redini, har redmørk eru góðkend. (Fyri okkara part havnirnar á Fuglafirði, tó ikki á Hellunum). Fyri upp- og avskiping frá bryggjuni á Hellunum verða tó somu skipanir galdandi, sum eru fyri øll gjaldsviðurskifti við Fuglafjarðar havn.
2. Vørugjaldið verður roknað eftir tí vekt, tí máti v.m., sum er tilskilað í skipsskjølunum, soleiðis at skilja, at farið verður eftir bruttovektini og ikki nettovektini.
3. Kann ein vøra verða roknað til ymiskar takstir, eigur tað gjaldið at verða valt, ið er til fyrimuns fyri gjaldaran. Av kolli við blandaðum innihaldi, verður roknað eftir teirri vøru, ið svarar til hægsta gjald eftir vekt.
4. Til "allar aðrar vørur" verða roknaðar allar vørur, ið ikki koma upp í ella kunnu verða roknaðar upp í tær vørur, ið eru tilskilaðar í takstinum niðanfyri.
5. Tangaskip og onnur før, sum bunkra olju frá oljuterminalinum, og sum ikki nýta oljuna til egna nýtslu, men selja ella lata hesa víðari til fiskiskip og onnur før bæði í føroyskum og útlendskum sjóøki, rinda fult vørugjald (sama vørugjald sum fyri innflutning) fyri útflutning bæði av gass- og tungolju.
6. Býráðið tekur avgerðir um flokkingar av teimum ymisku vørunum, sum verða upp- og avskipaðar eftir tilmæli frá vinnu- og havnanevndini um takstskipan.
7. Skipini ella teir, sum umboða hesi (skiparar ella skipaavgreiðslur) standa til svars fyri, at eitt eintak av vørulista (manifesti) verður latið havnaskrivstovuni í seinasta lagi 24 tímar eftir, at skipið er komið í havn. Áðrenn skipið fer úr havnini, skal skipið ella tann, sum umboðar tað, hava goldið vørugjaldið ella á annan hátt hava avtalað gjaldshátt við havnaskrivstovuna (havnastjóran). Annars stendur viðkomandi til svars mótvegis havnini (kommununi sum eigara).
8. Fyri útferð áliggur vørugjaldið tí, sum sendir vøruna, og fyri innkomu áliggur vørugjaldið tí, sum fær vøruna. Skipini hava tí regress mótvegis sendara/móttakara.

9. Vøra, sum verður uppskipað og virka á havnarøkinum til útflutnings, umframt vøra, sum kemur úr øðrum havnum, og sum flutt verður yvir vegakervið, kemur undir galdandi reglur í vøruskránni. Men er tó ikki umfata av A. Almennar reglur A.10 a)

### Serstakar ásetingar viðvíkjandi vørugjaldi

10. Vøra, ið verður flutt eftir vegakervinum til goymslu ella útflútning seinni, skal rinda vørugjald einaferð.
11. Serstakt vørugjald skal ikki rindast av vøru, ið verður flutt millum virkir á havnaøkinum, um vøran frammanundan er avgjaldsskyldug.

### 10. Undan at gjalda part av vørugjaldi sleppa:

a) Vørur, ið eftir farmaskjølum hava verið innfluttar til havnina, og sum tað soleiðis er goldið vørugjald fyri, tá ið tær koma inn. Hesar vørur sleppa undan vørugjaldi á útferðini so nógv sum tær hava goldið fyri

innkomuna, um tær innan fyri 3 mánaðar aftur verða útfluttar um kaikantin, og um vørur ikki hava verið virkaðar eftir uppskipingina. Er gjaldið fyri útferðina hægri enn fyri innkomuna, verður munurin at rinda.

b) Allar vørur, ið førdar verða inn ella uppskipaðar frá teimum undir I. A.2.c. og 3.c. nevndu førum, sleppa undan vørugjaldi á útferðini, um tað við uppskipanina er tilskilað, at tær skulu verða førdar út aftur eftir sjónum.
c) Undan sama gjaldi sleppa eisini vørur, sum tað er neyðugt at skipa upp ella umferma bráfangis, fyri at varðveita tær óspiltar ella av tí, at skipið er komið inn við pumpum, við slagsíðu osfr., alt hetta tó bert, um vørurnar aftur verða innskipaðar í sama far.
d) Vørur, ið verða innfluttar úr havnum uttan fyri Føroyar og eftir farmaskjølum eru ætlaðar til onnur støð í Føroyum, og sum verða útfluttar aftur eftir sjónum, rinda bert ½ gjald fyri innkomuna og einki fyri útferðina. (sí tó II. A. 6.j.).
e) Av oljuevnum, sum verða uppskipað í størri goymslumiðstøðir, og sum seinni verða flutt til goymslur á øðrum plássum, verður bert goldið ½ gjald fyri innkomuna í goymslumiðstøðina og einki fyri útferðina.
f) Vørur, ið verða uppskipaðar beinleiðis í annað far ella verða umfermdar frá einum fari í annað, tá ið talan er um vørur, ið eftir skipa- og farmaskjølum eru ætlaðar til støð uttan fyri Føroyar. Um hesar vørur verða lagdar upp á land, men boðað verður havnaskrivstovuni frá, at tær innan 14 dagar aftur verða fluttar sjóvegis, verður goldið fast kr. 21,50 fyri tonsið. Her er talan um transittvøru.

## 11. Undan øllum vørugjaldi sleppa:

g) Akker, ketur, togverk, skipssegl, skipsvistir og tílík skipstørvindi, ið verða útflýggjað til egna nýtslu hjá skipinum.
h) Sjómerki, tá ið tey verða send sum handilsvøra.
i) Brúkt embalasja, tómt endurflutningsgóðs og viðføri.
j) Vørur, reiðskapur, tól og tílíkt, ið havnin sjálv skal nýta til egna nýtslu, tó bert, tá ið hetta verður ført inn ella út uttan millumgongu av arbeiðstakara ella fyri arbeiðstakarar, ið við skrivligum sáttmála hava fingið tillutaðan rætt til at sleppa undan gjaldi.
k) Vørur og livandi djór, ið ætlað eru til framsýningar á almennum lista-,ídnaðar-, landbúnaðar-, fiski- ella sjóvinnuframsýningum her á landi og í øðrum londum, ella eftir, at hesi hava verið sýnd fram, verða send aftur. Alt tó bert, um prógvað verður, at luturin í roynd og veru er ætlaður til ávísa framvísan, og at tað, tá ið hann verður førdur aftur, fyriliggur ein váttan frá viðkomandi framsýningarnevnd um, at luturin hevur verðið sýndur fram og ikki er seldur ella á annan hátt avhendaður, meðan framsýningin fór fram.
l) Vørur, ið hava verið fermdar í skip, sum er avgreitt fyri útferð ella í hvussu so er skal fara, men sum aftur, áðrenn skipið er farið úr havnini ella um tað innan 3 ferðir 24 tímar kemur aftur uttan at hava verið inni í aðrari havn, skipað upp ella tikið inn farm – verða uppskipaðar ella umfermdar í annað far.
m) Vørur, ið verða uppskipaðar úr ella innskipaðar í herskip, eisini tá ið tey liggja á redini, um so er, at vørurnar hoyra til hesi skip.
Kistur við líkum og krukkum við øsku av líkum.
n) Vørur, ið beinleiðis verða uppskipaðar í annað far ella verða umfermdar úr einum fari í annað, tá ið hetta eru vørur, ið eftir skips- og farmaskjølum eru ætlað til onnur støð í Føroyum.

o) Um hesar vørur verða lagdar upp á land, men boðað verður havnaskrivstovuni frá, at tær innan fyri 24 tímar aftur verða fluttar sjóvegis, verður heldur einki vørugjald goldið av teimum.

## B. Ráfiskagjald

Havnin kann sambært gjaldsskránna krevja gjald fyri tonsið av uppskipaðum botnfiski.

Somuleiðis verður heimilað, í býráðssamtykt frá 29-06- 2017 og samtykt í vinnunevndini 20-06-2017, havnini at uppkrevja ráfiskagjald (krónur pr tons) fyri ídnaðarfisk og fiskasløg til matna.

# III. SKIPA- OG VØRUGJØLD FYRI STRANDFARASKIP LANDSINS

Fyri útrokning og avgreiðslu av havna-, brúgva- og vørugjøldum fyri Strandfaraskip Landsins í sigling innanoyggja og vørur, sum fluttar verða við teimum, verða hesar reglur at galda:

1. Eitt fast mánaðarligt gjald verður ásett av býráðnum eina ferð árliga tann 01. juni at galda fyri komandi fíggjarár.
2. Hetta gjald skal verða býtt í eitt havnagjald, eitt brúgvagjald og eitt vørugjald.
3. Fyri før hjá Strandferðsluni, sum sigla uttan fyri galdandi ferðaætlan, kann havnin taka havnagjald og brúgvagjald, sum annars tilskilað er í gjaldsskránni I.A. og I. B.

# IV. LEIGUGJØLD FYRI LENDI Á HAVNAØKINUM

Eftir at kunngerðin um Skipa- og vørugjøld varð tikin av sambært løgtingslóg nr. 45 frá 04. apríl 2000, og at kommunan eftir hetta hevur fullan avgerðarrætt til ásetingar av gjøldum til havnakassan, so hevur Fuglafjarðar havn (kommunan), ásett niðanfyri standandi prís:

a) kr. 25,00 fyri fermeturin fyri fyritøkur, ið rinda vørugjald til havnina
b) kr. 35,00 fyri fermeturin fyri fyritøkur, ið ikki rinda vørugjald til havnina
c) Er økið asfalterað ella stoypt, verður kostnaður kr. 50  fyri fermeturin.
d) Fyri bingjur ella skiftilastir á 20 fót er kostnaðurin kr. 5,00 um dagin, og fyri bingjur ella skiftilastir á 40 fót er kostnaðurin kr. 10,00 um dagin.
e) Kravt verður upp eina ferð um ársfjórðingin og minsta gjaldið er kr. 200,00.

Leigan verður uppkravd forút fyri hvønn ársfjóðring, hetta sambært treytunum í góðkendu leigusáttmálunum.

Fyri leysa leigu av økjum á havnarlagnum verður rindað kr. 30 fyri fermeturin um árið, og verður henda leiga uppkravd eina ferð um ársfjóðringin.

# V. ONNUR GJØLD

## Gjaldskrá

**Vørugjaldið verður kravt upp eftir niðanfyri tilskilaðu takstum:**

**Vørugjald fyri vøru, sum vanliga verður upp- og avskipað yvir Fuglafjarðar havn:**

| Vøra eftir vekt | 1000 kg | 1000 kg |
|---|---|---|
| **Slag av vøru** | **Fyri innkomu** | **Fyri útferð** |

### 1A. Fiskur og fiskaúrdráttur (produce) yvir kajkant

| | | | |
|---|---|---|---|
| a) | Fiskaflak, feskur fiskur, frystur fiskur, fars, herundir eisini kalvi, jakupsskel, hemari, laksur, rækjur, hummari, klippfiskur, saltfiskur o.a, men ikki pelagisk fiskasløg | **18** | **18** |
| b) | Sild, makrelur og onnur pelagisk fiskasløg til matna + botnfiskasløg (for food) | **15** | |

### 1B. Fiskamjøl (fish meal)

| | | | |
|---|---|---|---|
| 1B.Fiskamjøl (fish meal) | | **10** | **10** |
| a) | Hveiti Gluten | **10** | |
| b) | Soya bønir | **10** | |
| | | | |
| d) | Sild og livra-sildalýsi (fishoil) | **10** | **10** |
| e) | Fiskaslógv (Fish offal) | **10** | |
| f) | Niðursjóðaðar fiskavørur (preserve) | **18** | **20,40** |
| g) | Agnsild, høgguslokkur frá útheiminum (for baith) | **17** | |

### 2. Fóðurevni.

| | | | |
|---|---|---|---|
| a) | Fóðurevni, hoyggj, klit o.a. (feetingstuff) | | **36** |
| b) | Fóðurevni, niðursjóðað ella turkað, undantikið alifiskafóður | | **36** |
| c) | Alifiskafóðu og alifóðurvitarminir (Fish feed) | **10** | **10** |

### 3. Olja o.t.

| | | | |
|---|---|---|---|
| a) | Fuel- Marine- Gass- Diesel- og Tungolja | **15** | **15** |
| b) | | | |
| c) | Petrolium | **28,80** | |
| d) | Bensin | **43** | |
| e) | Smyrjolja og smyrjifeitt (Lube oil) | **110** | |

### II. Vegetabilsk:

| | | | |
|---|---|---|---|
| | Kokusolja, soyaolja, linolja o.t. | **50** | |

### III. Animalsk:

| | | | |
|---|---|---|---|
| | Hvalalysi og medisinlysi | **50** | |

### 4. Sandur o.a.t.

| | | | |
|---|---|---|---|
| a) | Sandur, skervur og grót innflutt | **5** | |
| b) | Sandur, skervur og grót úr Føroyum | **5** | |

**5. Bátar**

| | | | |
|---|---|---|---|
| | Bátar | **150** | **150** |

# Eftir vegakervinum

| **Vøra eftir vekt** | **1000 kg** | **1000 kg** |
|---|---|---|
| **Slag av vøru** | **Fyri innkomu** | **Fyri útferð** |

**1A. Fiskur og fiskaúrdráttur (produce)**

| | | | |
|---|---|---|---|
| a) | Fiskaflak, feskur fiskur, frystur fiskur, fars, herundir eisini kalvi, jakupsskel, hemari, laksur, rækjur, hummari, klippfiskur, saltfiskur o.a, men ikki pelagisk fiskasløg | | **18** |
| b) | Pelagisk fiskasløg fryst (Pelagic fish frozen | | **18** |
| c) | Sild, makrelur og onnur pelagisk fiskasløg til matna + botnfiskasløg (for food) | | **18** |
| d) | Ídnaðarfiskur av havnaøki | | **18** |

**1B. Fiskamjøl & fiskamjøl úrdráttir**

| | | | |
|---|---|---|---|
| a) | Fiskamjøl (Fish meal) | **10** | **10** |
| b) | Fiskaslógv (Fish offal) | **10** | **10** |
| c) | Alifiskafóður & alifóðurvitaminir (Fish feed) | **10** | **10** |

**3. Til vinnuligt virksemi olja o.t.**

| | | | |
|---|---|---|---|
| a) | Fuel- Marine- Gass- Diesel- og Tungolja | **15** | **15** |

**6. Aðrir prísir**

| | | | |
|---|---|---|---|
| | Fyri allar aðrar vørður verður víst til fylgiskjal, ið er til skjals á havnaskrivstovuni og á heimasíðum hjá Fuglafjarða kommunu/havn | | |

**III Onnur gjøld**. **Fyri aðrar tænastur, sum havnin letur, eru hesir prísir vegleiðandi**:

**1. Aliringar**

| | | | |
|---|---|---|---|
| | Við bryggju | **Pr. ring pr døgn** | **144** |

**2. Landstreym**

| | | | |
|---|---|---|---|
| | El til skip við bryggju | **Pr. KWh** | **Dagsprís + 30%** |

**3. Ferskvatn**

| | | | |
|---|---|---|---|
| | Vatn til skip við bryggju | **Pr. tons** | **18** |
| | Vatn til virkir á Havnalagnum* | **Pr. tons** | **2,75** |

**4. Spill olja & burturkast**

| | | | |
|---|---|---|---|
| 4.1 | Spill olja avgreiðslugjald umframt avgjald til IRF** | | **450** |
| 4.2 | Burturkast avgreiðslugjald umframt avgjald til IRF** | | **450** |

**5. Crusiseskip**

| | | | |
|---|---|---|---|
| | Trygdargjald hvørja ferð tey koma ella seta fólk í land | | **3000** |

**6. Fastgerð og loysing**

| | | | |
|---|---|---|---|
| | Fyri hvønn mann vanlig tíð | | **400** |
| | **Fyri hvønn mann yvirtíð** | | **580** |
| | **Fyri leygar-,sunnu- og halgidagar** | | **700** |

**Loðsgjøld**

| | | | |
|---|---|---|---|
| 7. | Loðsgjald max 2 tímar (minimun price) | | **2.200** |
| 8. | Loðsgjald meira enn 2 tímar fyri tíman | | **700** |

* Gjaldið pr. Tons hækkar 01.01.2025 til kr. 3,00

**Víst verður til heimasíðuna hjá IRF
Allir prísir eru uttan MVG

**Allar eldri takstskipanir fara úr gildi.**

***Góðkend av Fuglafjarðar býráð 25. januar 2024***